# Lærarastørv í Miðvágs-Sandavágs skúla



Søkt verður eftir lærarum til Miðvágs-Sandavágs skúla.

- **1 lærara í fast starv frá 1. august 2007**
- **3 lærarar í tíðaravmarkað fulltíðarstørv skúlaárið 2007/2008**
- **og 1 lærara í tíðaravmarkað starv 16-20 t/v skúlaárið 2007/2008**

*tíðaravmarkaðu størvini eru fyri lærarar, sum hava farloyvi, lækkað tímatal og til at lesa stuðulstímar og avlopstímar komandi skúlaár.*

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við starvsfelagarnar í skúlanum kunnu undirvísa og taka lut í dagliga virksemi skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka við avbjóðingum og broytingum, sum kunnu menna og skapa virðing fyri skúlanum
- seta ein heiður í at vera stundisligir og nærlagdir og halda fast um stavnhaldið, at **í okkara skúla skulu øll kenna seg væl og trívast.**

Skúlin hevur brúk fyri fólki, sum kann átaka sær at undirvísa í:
gentu- og dreingja ítrótti og svimjing, tónleiki, træsmíð, motorlæru, týskum, rokning á byrjanar- og miðstigi og donskum á miðstigi, serundirvísing og einum, ið kann átaka sær flokslærarauppgávuna í 6. flokki

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu verða skúlastjóranum í hendi í **seinasta lagi leygardagin 16. juni 2006 kl. 16.00.**

Nærri fæst at vita við at skriva, ringja ella koma á tal við Hans Jørgensen, skúlastjóra, Heiðavegur 7, 370 Miðvágur. Telefon 33 28 20 – 33 23 18 ella 21 88 20. Teldupostur mss@skulin.fo.

*Miðvágs-Sandavágs skúli húsast í løtuni í trimum skúlabygningum. Fyrsti flokkur í gamla skúlanum í Sandavági, annar, triði og fjórði flokkarnir í skúlanum í Miðvági og fimti – tíggjundu flokkarnir í meginskúlanum á Giljanesi.*
*Skúlabygnaðurin og bygningarnir hava umfatandi nútímansgerð fyri neyðini. Nýtt skitsuprojekt er gjørt til nýggjan skúla, og leiðslan og lærarahópurin vóna, at ferð nú kemur á.*
*Í skúlaverkinum verða 255 næmingar í 14 flokkum komandi skúlaár. Lærarataliðið verður uml. 25.*

Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/mss

---

STUÐULSSTOVNURIN
The Faroese Student Grant Fund

## Skrivstovufólk/málsviðgeri

**Starvið:**
Av tí at eitt av starvsfólkum okkara fer í annað starv, er eitt áhugavert starv sum skrivstovufólk/málsviðgeri leyst at søkja á Stuðulsstovninum skjótast gjørligt ella frá 1. august 2007.

**Høvuðsuppgávur:**
- Málsviðgerð í ÚSUN-skipanini*
- Vanligar skrivstovuuppgávur

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving, HH/student ella líknandi
- Góðan kunnleika til enskt í skrift og talu*
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv.
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanar- og lønartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og deildir/stovnar tess.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja á Lakjuni, leiðara á telefon 35 68 00.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

**Stuðulsstovnin**
Stílað: Terja á Lakjuni
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
FO - 110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi **seinasta lagi 25. juni 2007.**

- Í ÚSUN-skipanini verður útbúgvingarstuðul veittur til tey, ið lesa uttanfyri Norðurlond. Tað er í hesum sambandi at kunnleiki til enskt er ein fyrimunur.

*Stuðulsstovnurin er ein stovnur undir **Mentamálaráðnum**, ið hevur til uppgávu at veita fíggjarligan stuðul til lesandi føroyingar. Á **Stuðulsstovninum** starvast 5 fólk. Stovnurin rindar mánaðarligan lestrarstuðul til umleið 2.000 lesandi í Føroyum og árligan ferðastuðul til umleið 1.100 lesandi uttanlands, umframt at veita lestrarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN). Harumframt krevur stovnurin inn lestrarlán frá umleið 2.500 persónum. Stuðulsstovurin hevur í 2007 eina útreiðslujáttan uppá 2,8 mió. kr., og veitir uml. 92 mió. kr. í lestrarstuðli.*

---

# Starvsfólk til:
INTERSPORT
# Tórshavn

**Søkt verður eftir lærlingi til Thomas Dam ítrótt í Tórshavn.**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar. Umframt handilin í Tórshavn hava vit eisini ein á Glyvrum og ein í Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta lærupláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

***Thomas Dam Ítróttur***
***Niels Finsensgøta 5***
***Boks 268***
***FO-110 Tórshavn***

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR
Niels Finsensgøta 5 · boks 268 · FO-110 Tórshavn

---

# FØRARI TIL betongpumpubil

Søkt verður eftir førara til betongpumpubil.

Talan er um støðugt arbeiðið.

Teir, ið settir verða kunnu byrja beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

**J & K Petersen Contractors**

J&K

P/F J & K Petersen · Á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf 315060 / 585025 · betong@jkp.fo

---

# LASTBILFØRARI

Søkt verður eftir førara til lastbil.

Talan er um støðugt arbeiðið.

**J & K Petersen Contractors**

J&K

P/F J & K Petersen · Á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf 315060 / 585001 · jkp@jkp.fo

---

# *Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800

---

## STARV

Sp/f Heimabakaríið søkir eftir tilkomnum fólki at byrja at arbeiða í bakarahandlinum hjá okkum í Sverrisgøtu 7,

Arbeiðstíðirnar eru mánadag til fríggjadag og eftir avtalu.

Vekur hetta tín áhuga, so kanst tú ringja til Jóhannes og fáa meira at vita á tlf: 232660.